# Føroya Tele

**Maskinmeistari søkist**

Søkt verður eftir maskinmeistara ella fólki við líknandi útbúgving til Byggi- og Eldeilduni hjá Føroya Tele. Umsøkjarar, ið hava el-góðkenning hava fyrimun, men hetta er eingin treyt.

Byggi- og Eldeildin hevur arbeiðsuppgávur um alt landið, m. a.:

- Rakstur og viðlíkahald av bygningum og el-installatiónum
- Prosjektering av ný- og umbyggingum
- Byggieftirlit
- Rakstur og viðlíkahald av dieselmotorum
- Rakstur og viðlíkahald av køli- og ventilatiónsskipanum
- Rakstur av CTS-anleggum

Á deildini starvast installatørur, elektrikari, byggifrøðingar og húsavørðar.

Starvið er eitt áhugavert framtíðarstarv. Tann ið verður settur kemur at hava dagligu rakstrarábyrgdina av dieselaggregatum, køling, ventilatión, CTS o.ø. Saman við leiðaranum kemur hann eisini at gera langtíðarætlanir í samband við nevndu uppgávur.

Umráðandi er, at umsøkjarin hevur royndir í at arbeiða sjálvstøðugt, og eisini er førur fyri at arbeiða saman við øðrum.

Starvsstaðurin er Tórshavn, men umsøkjarin skal eisini ferðast um landið og skal tí hava koyrikort.

Lønin verður sambært sáttmála hjá avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Kára Dal-Christiansen, deildarleiðara á telefon 303030.

Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. oktober 2000. Umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
Fo-110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

# Føroya Tele

**Starvsfólk til Goymsluna**

Søkt verður eftir starvsfólki til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. november ella skjótast møguligt.

**Uppgávurnar eru:**
Vøruútflýggjan, skráseting og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

**Tín førleiki:**
Tú skal hava royndir innan goymslu ella líknandi og dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Eisini er fyrimunur um tú hevur:**
- royndir við EDV (á brúkarastøði)
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Kunnleiki til enskt er ein fortreyt.

Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Mikkelsen á tlf.: 303030, lok. 3224.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. september 2000.

Umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*



# Stóra bringu

## -ella lítla?

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

GEVID BLÓÐ

**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

# Landsstevnan 2000

Landsstevna Javnaðarfloksins
verður
**í Læraraskúlaskálanum**
**fríggjadagin 22. september kl. 20**
og
**leygardagin 23. september kl. 9 til 18**

Allir limir floksins hava rætt at taka lut á stevnuni.

**Føroya Javnaðarflokkur**

sosialurin
www.sosialurin.fo

# Norðstreymoyar Javnaðarfelag

## Ársaðalfundur

verður í Róðrarneystinum í Streymnesi
**mikukvøldið 20. september kl. 20.00**
Skrá sambært lógum felagsins.
Løgtingsumboð luttaka.

**Norðstreymoyar Javnaðarfelag**

# Vatnskutari til sølu



Yamaha XL 700 frá 05.05.2000.
Ring og hoyr nærri

**Watersport · Tvøroyri**
**Tlf. 37 21 10 • Mobil 21 52 10**





# Fuglafjarðar Kvøldskúli Veturin 2000/2001

| Lærugrein | Tíð | Lærari | Tlf. |
|---|---|---|---|
| **Hondarbeiði:** Broderíir – eisini til før. búnan | Tý. 15.30-19.00 Tý. 19.00-22.30 | Jessie Høgagarð | Tlf. 447290 |
| **Jólaseyming:** | 20 t. skeið í november | Odvør á Lakjuni | Tlf. 444440 |
| **Fimleikur:** Callanetics | September November | Áshild Kristiansen Steintóra H. Nesá | Tlf. 444621 Tlf. 444720 |
| **Hornblástur:** | Tý. 19.00-21.35 Hó. 19.00-21.35 | Sharon Fisher | Tlf. 457783 |
| **Manskór:** | Má. 20.00-22.35 | Heðin Kambsdal | Tlf. 444596 |
| **Gentukór:** | Má. 17.30-19.10 | Eyðun á Lakjuni | Tlf. 444990 |
| **Tekning og máling:** | Má. 19.00-22.30 Tý. 19.00-22.30 | Randi Gunnarsdóttir | Tlf. 444385 |
| **Ro/støddfrøði:** 8. 9. 10. fl. støði | Tíð eftir avtalu | Jónsvein Poulsen | Tlf. 444738 |
| **Enskt:** 8. 9. 10. fl. støði | Tíð eftir avtalu | | Tlf. 444087 |
| **Føroyskt:** Sum fremmant mál (og heimkomnar útisetar) | Mi. 19.00-20.40 | Jógvan F. Poulsen | Tlf. 445165 |
| **Teldulæra:** Tekstviðgerð | Hó. 19.00-20.40 | Kjartan Madsen | Tlf. 444774 |
| **VHF-skeið:** Uml. 20 tímar | Tíð eftir avtalu | | Tlf. 444087 |
| **Trolarbeiði:** | Tý. 19.00-22.30 | Steingrím av Vollanum | Tlf. 444715 |
| **Svimjing:** Ætlað menningartarnaðum | Hó. 16.00-17.30 | Malena Hansen | Tlf. 444381 |
| **Fyrstahjálp:** Grundskeið - Víðkað skeið - 30 t íalt | Tíð eftir avtalu | William Askham | Tlf. 444855 |
| **Drama:** Sjónleikur | Vikuskiftisskeið okt., jan., febr. | | Tlf. 444087 |
| **Bridge:** Grundskeið | Má. 19.00-20.40 | Símun Lassaberg | Tlf. 444401 Tlf. 219201 |

Skeiðini byrja eftir avtalu við læraran. Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum.

Luttøkugjaldið er einaferð 200 kr. + 2 kr./tíma og skal gjaldast læraranum *fyrsta kvøldið*.

Luttakarar gjalda fyri tilfar og ávísar bøkur.

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**Tlf. 44 40 87**

*Halt* **sosialin**

# Deildarstjórar
## í Vinnumálastýrinum

Tvey deildarstjórastørv í Vinnumálastýrinum til ávikavist vinnumáladeildina og samskiftisdeildina verða við hesum lýst leys til setan eftir nærri avtalu.

**Vinnumáladeildin**
Vinnumáladeildin stendur fyri at samskipa virksemið hjá landsstýrinum á vinnu- og arbeiðsmarknaðarøkinum. Ein høvuðsuppgáva er at lýsa teir karmar, sum tann almenni vinnupolitikkurin skapar fyri vinnulívið.

**Samskiftisdeildin**
Samskiftisdeildin stendur fyri at samskipa virksemið hjá landsstýrinum á samskiftis- og samferðsluøkinum. Ein høvuðsuppgáva er at lýsa teir karmar, sum tann almenna infraskipanin skapar fyri vinnulívið.

**Deildarstjórarnir**
Deildarstjórarnir hava hesar uppgávur:
- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini
- Ráðgeva stovnum
- Ábyrgd av lógararbeiðinum á deildini
- Taka fyrisitingaravgerðir innan málsøkini
- Vera limur í leiðslubólkinum í Vinnumálastýrinum
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjararnir m.a. hava:
- Hægri útbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði, umsiting e.l.
- Royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting
- Góð samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um spennandi størv. Deildarstjórarnir vera við til at skapa karmarnar á hesum umsitingarligu økjunum, sum hava stóran týdning fyri alt stýrið.

**Løn og setanartreytir**
Setanin fatar um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri. Størvini eru flokkað ájavnt 36. lønarflokki hjá Tænastumonnum Landsins, men eru tó ikki tænastumannastørv. Flokkingin verður endaliga av-greidd við viðkomandi yrkisfelag, tá ið starvið er sett.

Møguleiki er fyri, at starvsøkini verða víðkað/broytt, og mugu tey, sum sett verða, tola hetta.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:
**Vinnumálastýrið**
**Postrúm 377**
**FO-110 Tórshavn**

Umsóknarfreistin er 9. oktober 2000. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Arna Poulsen, tel 35 60 60.

**V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð**

# Umbýti av koyrikortum

Nú er seinasti møguleiki at býta gamla koyrikort sítt um við eitt nýtt koyrikort í ES-sniði. Sambært kunngerð nr. 5 frá 21. januar 1998 fara øll gomul koyrikort, ið ikki eru í ES-sniði úr gildi 31. desember 2000.

Koyring við gomlum ógildugum koyrikorti aftan á ársskiftið, verður av løgregluni sektað við 300 kr. í bót.

Umbýtið fer fram á Bileftirlitinum og uttan fyri Havnina á politistøðunum.

Tað kostar 250 kr. at umbýta koyrikortið. Við umbýti á politistøðunum, skal gjaldið vera goldið frammanundan, antin í banka ella á posthúsi.

Hav gamla koyrikortið við, væltrofna portrettmynd (hattleys), kvittan og møguligt navnabræv, um navnabroyting er farin fram.

Tórshavn, hin 7. september 2000
**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57 • 110 Tórshavn
Tlf. 350400/fax 350401 • Teldupostur: bef@bef.fo